# Ein einsamallur maður hevði ikki megnað at bjargað Hans Magnusi

**Tað eru teir báðir kollfirðingarnir, Christian Christiansen og Jens Joensen, sum bjargaðu Hans Magnus Hansen á Norðhavinum mánadagin, samdir um**

BJARGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

– Okkara størsta vónbrot hevði verið, um vit ikki megnaðu at bjarga Hans Magnusi Hansen, tá ið vit komu fram á hann og sjóbrotna bát hansara, Norðstjørnuna, mánadagin.

Tað siga teir báðir, Christian Christiansen og Jens Joensen, sum mánadagin bjargaðu útróðrarmanni, ið var deyðanum ógvuliga nær.

– Báturin, Elin C, er ein íslendskur bátur, Seigur 33. Hann er nógv hægri upp á lúnningin enn ein vanligur føroyskur bátur. Tí var tað ikki lætt at fáa fatur á Hans Magnusi og fáa hann inn í bátin.



*– Eg rópti á Magnus og bað hann halda fast. Tað var, sum um hann ernaðist eitt sindur, tá ið hann sá okkum. Hann líkasum rætti hondina upp og vildi siga, at hann var har, sigur Jens Joensen, sum stendur høgrumegin á myndini*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Triðju ferð

Christian og Jens gjørdu fyrst tvær miseydnaðar royndir at fáa fatur á Hans Magnusi, men tað var ikki, fyrr enn teir gjørdu ta triðju royndina, at teir fingu fatur á honum.

– Umstøðurnar vóru alt annað enn góðar. Veðrið var vánaligt við nógvari aldu og vrakið av bátinum, sum at kalla stóð steyrrættur í sjónum við gronini uppeftir, gjørdi tað eisini truppult at sleppa fram Magnusi.

Teir eru báðir samdir um, at tað hevði verið eitt stórt vónbrot fyri teir, um Magnus hevði farist, meðan teir stríddust við at fáa fatur á honum.

Tá ið teir komu til vrakið, sóu teir ikki mannin beinanvegin, tí framparturin av kjølinum vendi ímóti teimum. Tað var ikki, fyrr enn teir snaraðu um vrakið, at teir sóu, at maður stóð á framrútinum og helt í fanglínuna.

– Eg rópti á Magnus og bað hann halda fast. Tað var, sum um hann ernaðist eitt sindur, tá ið hann sá okkum. Hann líkasum rætti hondina upp og vildi siga, at hann var har, sigur Jens.

Magnus hevði vundið fanglínuna um armin, og hetta var hansara bjarging.

### Um skrúvuna

Christian og Jens siga, at Elin C tók í vrakið á Norðstjørnuni, og meðan teir royndu at bjarga Magnusi, fingu teir eisini um skrúvuna, soleiðis at báturin "aktaði" ikki so væl.

– Skrúvan hevur eisini fingið onkran stoytin, og ivasamt er, um aksilin er skaddur.

Teir eru báðir samdir um, at var ein einsamallur maður komin fram á Magnus í einum glastrevjabáti, hevði tað neyvan eydnast at bjarga honum.

– Tað var eitt rættiligt tak hjá tveimum monnum at fáa hann inn í bátin, tí sjálvur var hann ikki førur fyri at hjálpa til, so útlúgvaður var hann, siga Christian og Jens.

Á veg til lands, sat Magnus í einum av stólinum í stýrhúsinum.

– Vit hjálptu honum úr vátu klæðunum og ballaðu hann inn í eitt teppi. Einar tvær ferðir á veg til lands ringdu teir úr sjúkrabilinum til okkara og spurdu, hvussu gekst.

Men veðrið var so vánaligt, og Christian og Jens vistu ikki, hvussu vorðið var við bátinum.

– Tí tordu vit ikki at sigla við fullari ferð. Haraftrat kemur, at Magnus var so mikið útssaligur, at hann syftist í stólinum, har hann sat. Hann var ikki mentur at ansa so væl eftir, tá ið báturin syftist aftur og fram í aldunum.

Christian, sum eigur Elin C, sigur, at báturin gongur út við 20 míl, men á veg til lands sigldu teir við umleið 10-12 míla ferð.

– Hóast hetta er nógv ferð, tóktist tíðin til lands ógvuliga long.

### Hoyrilíkindini

Teir fýlast báðir at vánaligu hoyrilíkindunum norðanfyri, sum tarnaðu samskiftinum um WHF'in – eisini, tá ið umráðandi var at hava samband við sjóbjargingarstøðina, MRCC Tórshavn.

– Høvdu vit havt brúk fyri hjálp og vegleiðing inneftir Flógvanum, hevði hetta verið ein trupulleiki, siga teir báðir, sum halda, at hetta er ov vánaligt, tá ið havt verður í huga, at nógv bátaferðsla er norðanfyri um várnarnar.

Tað vóru tveir glaðir menn, sum Sosialurin hitti og tók myndir av í Sundinum í Kollafirði hósmorgunin.

# Skúlin í Lamba útbygdur og umvældur

**Aftrat verandi aktivitetum við eitt nú sunnudagsskúla og gudstlænastum einar fýra ferðir um árið, fer skúlin nú eisini at hýsa børnum við autismu**

LAMBA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Síðan seinast í fimtiárunum hevur eingin skúlagongd verið í barnaskúlanum í Lamba. Skúlin hevur í staðin verið nýttur til onnur endamál, eitt nú sunnudagsskúla og onnur tiltøk, sum hava verið í bygdini. Einar fýra ferðir um árið plagar prestur eisini at hava gudstænastu í skúlanum.

### Børn við autismu

Men hóast eingin skúlagongd hevur verið í Lamba í mong ár, hevur Runavíkar kommuna kortini valt – ikki bara at seta verandi skúla í stand, men hevur bygt ein bygning aftrat, sum er umleið líka so stórur, sum gamli skúlin var. Hølini eru nú sum spildurnýggj við tveimum stórum salum, wc'um og køki.

Aftrat verandi aktivitetum í skúlanum, fer skúlin nú eisini at hýsa børnum við autismu. Hesi hava hildið til í kjallaranum í Elim í Søldarfirði. Í fyrsta lagi er talan um trý børn.

### Ein góð miljón

Skúlin í Lamba er umvældur og útbygdur fyri eina góða miljón og hølini, sum eru fingið fyri henda pening, eru sera snotulig og kunnu nýtast til mong endamál.

Tey tiltøk, sum hava verið í gamla skúlanum, vera verandi, hóast hann nú eisini verður nýttur til børn við autismu.



*Gamli skúlin í Lamba er umvældur og útbygdur. Umframt tey tiltøk, sum vanliga eru í skúlanum, verður hann nú eisini karmur um børn við autismu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Varasendiharrin hjá Kanada á vitjan

Varasendiharrin hjá Kanada í Danmark, Brian Herman (Charges D'Affaires) var á vitjan í Føroyum 23. og 24. mars. Meðan bíðað verður eftir at nýggjur sendiharri verður settur, er Brian Herman ovasta umboðið fyri Kanada í Danmark

Týsdagin hevði kanadiski varasendiharrin fund við løgmann, har tosað varð m.a. um møguleikar at bøta um handilsviðurskifti landanna millum. Í síni samrøðu við varasendiharran legði løgmaður serligan dent á týdningin av at menna samstarvið við Kanada um felagsáhugamál viðvíkjandi havið og fiskivinnu í Norðuratlantsøkinum.

Seinnapartin týsdagin hevði varasendiharrin fund við landsstýrismannin í fiskivinnumálum, har støðan í rækjuvinnuni og føroysku krøvini í sambandi við rækjukvotur í NAFO økjum vórðu umrødd. Um kvøldið var ríkisumboðið vertur fyri ein døgurða.

Seinnapartin týsdagin vitjaði varasendiharrin gravirnar í kirkjugarðinum í Tórshavn hjá teimum seks kanadiarunum úr Royal Canadian Air Force, ið doyðu í Føroyum í seinna heimsbardaga. Varasendiharrin er umboð fyri Kanada í eini felagsnevnd hjá Danmark og bretska samveldinum, ið hevur til endamáls at røkja gravir hjá hermonnum úr bretska samveldinum, ið eru í danska ríkinum.

Mikudagin 24. mars hevur varasendiharrin fund við landsstýrismannin í vinnumálum, umframt at vitja Menningarstovuna, Mentamálaráðið, Fróðskaparsetrið, Listasavnið og Norðurlandahúsið. Seinnapartin mikudagin fer túrurin til trolvirkið Vónina í Fuglafirði og Bátasavnið í Leirvík. Mikukvøldið er Fiskimálaráðið vertur fyri ein døgurða.



*Seinnapartin týsdagin vitjaði varasendiharrin gravirnar í kirkjugarðinum í Tórshavn hjá teimum seks kanadiarunum úr Royal Canadian Air Force, ið doyðu í Føroyum í seinna heimsbardaga*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

## Finleif Mortensen í Smiðjuni í Lítluvík



**Í dag, fríggjardagin 26. mars kl. 15.00, letur ein málningaframsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík. Tað er Finleif Mortensen av Argjum, sum sýnir fram**

Við á framsýningini eru 25 málningar, sum eru málaðir tað seinasta árið.

Myndaevni er tann føroyska bygdin við havið, tað skiftandi ljósið, skoðanin út í havsbrúnna og longsulin eftir várinum, "várlongsul", sum eisini er heitið á fleiri av málningunum.

Annars skal Finleif hava framsýning í Gallarí Oynni á Tvøroyri. Tann framsýningin letur upp leygardagin 3. apríl, og hon verður tikin niður aftur flaggdagin 25. apríl. Sostatt verður hon øll páskini.

Finleif hevur røtur úr Fámjin og úr Sandvík, og á hesi framsýningini verða eisini málningar úr Suðuroy. Finleif sigur, at hann er mangan í Suðuroy, og tá ið hann ferðast, hevur hann altíð skitsublokkin við og ofta spyrjast málningar burtur úr seinni.

Framsýningin er opin til og við týsdagin 30. mars. Opið verður soleiðis: fríggjadagin: 15-20, leygardagin: 10-13 og kl. 14-20, sunnudag til týsdag: kl. 14-20.

Frelsunarherurin í Vági:

## Vígsla av nýggju hølunum í kvøld

TÍÐINDASKRIV

Í kvøld, fríggjakvøldið 26. mars kl. 20.00, verður vígsla av nýggju hølunum hjá Frelsunarherinum í Vági.

Ein tíma áðrenn verður skipað fyri skrúðgongu frá gomlu hølunum og út í nýggju hølini.

Horntónleikarar úr Havn luttaka og nógvur sangur og musikkur verður.

Landsleiðarin fyri Frelsunarherin í Noreg, Íslandi og Føroyum, kommandør Donald B. Ødegaard, stendur fyri vígsluni. Drekkamunnur verður aftaná fundin. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Dagurin

**26. mars. Gabriel**. Beint eftir mariumessu er nevndur høvuðseingilin Gabriel, sum bar tey góðu tíðindini.

Navnið merkir *guðsmaður*.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin

## Tøkk

Stjóra, starvsfólki og starvsfelagum mínum í P/F Statoil Føroyar takki eg hjartaliga fyri at tit gjørdu fríggjadagin 27. februar til ein ógloymandi dag fyri meg og familju mína.

Vinarliga heilsan
**Kári**